**Magnus Rasmussen**
**løgtingsmaður**

**Nr. 54/2018**

**Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a**

**Fyrispurningur um at seta á stovn ein fiskimannaskúla, settur landsstýrismanninum í skúlamálum, Honnu Jensen (at svara skrivliga eftir TS § 52a)**

Verður arbeitt við at fyrireika ein fiskimannaskúla í Føroyum?

**Viðmerkingar:**
Beint fyri jól í 2018 skrivaði Jógvan Ingvard Olsen, fyrrverandi løgtingsmaður av Toftum, eina sera áhugaverda og beinrakna grein í bløðunum við heitinum: ***Neyðugt er við fiskimannaskúla.***

M.a. verður í greinini greitt frá gongdini og broytingini hjá fiskimanninum upp gjøgnum tíðirnar, fram til dagin í dag. Frá at ***"føroyingar eru føddir við ár í hond"*** til, at nú fer ungdómur næstan ikki í bát longur.

Veruleikin er, at lítil og eingin tilgongd er ímillum ungdómin longur til at gerast fiskimaður, og verður ikki sett við, so endar galið. Fyrr varð sett við á tann hátt, at flestu dreingir fóru til skips aftan á 14 ára aldur, og har vórðu teir so upplærdir til alt, sum hevði við fiskiskap og hagreiðing av fiski at gera og harumframt upplærdir til góðan sjómansskap.

Nú tíðin er farin frá gamla viðsetingarmynstrinum, so er spurningurin, hvat so er at gera. Her er tað, at hugskotið um at stovnseta ein fiskimannaskúla í Føroyum kemur, har dentur eigur at leggjast á bæði tann yrkisliga og tann bókliga førningin  Fyrireikingarnar til eitt lógarvek kundu m.a. verið gjørdar í samstarvi millum Mentamálaráðið, Fiskimálaráðið, Útróðrarfelagið, Fiskimannafelagið, Reiðarafelagið, Skipara- og Navigatørfelagið og Motorpassarafelagið.

Mín áhugi er at frætta, hvørt Mentamálaráðið hevur loftað hesum góða hugskoti og er farið at arbeiða við at fyrireika ein fiskimannaskúla.

**Á Løgtingi, 22. februar 2019**

Magnus Rasmussen